## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av útnyrðingi og ælingur, partvís vátaslettingur, men um kvøldið minni vindur og yvirhøvur turt. Hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Fyrrapartin lot av landsynningi og regn eitt skifti. Seinnapartin veksur hann viindin upp í hvassan vind av útsynninigi og ælingur. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av norði og landnyrðingi og ælingur, partvís vátaslettingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 3 og 6 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin lot av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men sunnudagin strúkur í vindi av suðri og regn av og á. Hitin millum 6 og 10 stig.

Frá Konsertfelagnum:

# Barokktónleikur í Runavík, í Havn og í Oyndarfirði



**Nú í vikuni skipar Konsertfelagið fyri tveimum konsertum við Monicu Stauss Joensen, violin og Helene Ringgenberg, cembalo og orgul. Konsertirnar verða í Runavík og í Havn. Eisini fara tær at spæla í samband við guðstænastu í Oyndarfjarðar kirkju**

Monica er ættað úr Sveits og hevur í mong ár búð í Leirvík. Hon er kend sum ein sera dugnaligur violinspælari og er ofta at hoyra í tí føroyska musikklívinum, bæði sum kamarmusikari og sum limur í Føroya Symfoniorkestur.

Monica hevur tikið sína útbúgving bæði í Sveits og Jugoslavia. Nýliga tók hon tvey diplom á the Royal School of Music í London.

Helene Ringgenberg er eisini ættað úr Sveits og býr har. Hon hevur tikið diplom sum organistur, kórdirigentur og cembalistur á lærda háskúlanum í Bern.

Cembalo er eitt ljóðføri sum sjálvdan er at hoyra her á landi. Nú er so møguleikin har. Monika fer at strúka við einum sokallaðum barokkboga sum hon ognaði sær síðsta summar úr London. Violinin, strokin við barokkboga, gevur ein klang sum passar væl saman við cembaloklanginum. Ein kann ímynda sær, at soleiðis hevur tað ljóðað í barokktíðini.

Tær báðar hava samarbeitt nógv og hava saman spælt eina røð av áhugaverdum konsertum. Tær hava spælt fleiri staðni í Sveits, m.a. í samband við Bach-festivalin í høvuðsstaðnum Bern. Eisini spældu tær á framsýningini, sum Ása Hátún hevðir í Winterthur í 2001. Willi Gohl skipaði fyri framsýningini. Í 2002 spældu tær í San Luis Obisko í USA.

Tær hava fleiri ferðir spælt saman í Føroyum. Seinast var í september 2002 í Leirvíkar Bátasavni. Sum eitt innslag á tí konsertini greiddu Willi Gohl og Ólavur Hátún frá 30 ára samstarvi teirra.

Skráin á konsertunum hesaferð fevnir í høvuðsheitum um barokktónleik. Hesin passar væl til framførslu bæði í konserthøll og í kirkju. Tónaskøld sum Handel, Bach, Albinoni og Hayden eru á skránni, also ein áhoyraravinarlig skrá.

Helene Ringgenberg vil fegin undirvísa meðan hon er her. Tað snýr seg um undirvísing í orgulspæli, cembalospæli, generalbassspæli og kontrapunkt. Tað verða helst organistarnir í landinum, sum fara at vísa hesum tilboði áhuga.

Hevur tú áhuga, so ring til Monicu á tlf. 443259.

Fyrsta konsertin verður í býráðshøllini í Runavík mikudagin 8. oktober kl. 20.00 Leygardagin 11. oktober kl. 11.30 fara tær at hava matiné í Havnar kirkju og sunnudagin 12. oktober kl. 12 fara tær at spæla í samband við guðstænastu í Oyndarfjarðar kirkju.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷4 |
| Nuuk | 2 |
| Qaqortoq | 6 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | 18 |
| Halifax | 11 |
| Reykjavík | – |
| Seyðisfjørður | 2 |
| Tórshavn | 8 |
| Lerwick | 9 |
| Aberdeen | 10 |
| London | 14 |
| Tromsø | 7 |
| Bergen | 6 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 12 |
| Keypmannah. | 12 |
| Helsinki | 6 |
| Moskva | 17 |
| Berlin | 10 |
| Warzawa | 11 |
| Kiev | 10 |
| Bukarest | 14 |
| Paris | 10 |
| Madrid | 15 |
| Róm | 20 |
| Malorca | 21 |
| Athen | 25 |
| Malta | 24 |
| Tunis | 23 |
| Beijing | 14 |
| New Dehli | 31 |
| Bangkok | 28 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 16 |
| New York | 13 |
| Miami | 29 |
| Los Angeles | 18 |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | 29 |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 23 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 980 hPa. eystan fyri Føroyar fer í landsynning. Eitt annað lágtrýst, 995 hPa. við Hvarvið fer móti Íslandi og dýpist.




Lágtrýstið í útsynning úr Íslandi, ex »KATE«, fer spakuliga móti Íslandi. Brúgvalagið haðani verður við Føroyar hósdagin.

### HITALAGIÐ




Hitalagið márt frá 06/10 kl. 06[00]– 07/10 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 6,2°
Minsti hiti máldur í okt.: ÷4,0° Mesti hiti máldur í okt.: 18,4°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 1,3 mm – márt frá 06/10 kl. 06[00]–07/10 kl. 06[00]
Avfallið higartil í oktober: 12,7 mm


HESTPRENT Spf.
…hvør sigur at vit eru sum onnur?
Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 31 45 55
fax 31 80 26
hestoy@hestprent.fo

GEVIÐ BLÓÐ
BLÓÐBANKIN
Telefon 311397


## VESTFALLSKYRRINDI

28. septemb.: Mánin næstur jørðini
2. oktober: Fyrra kvarter
10. oktober: Fullmáni
14. oktober: Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2003

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 8. okt | 06.06 | 18.26 | 05.06 | 17.26 | 05.21 | 17.41 | 08.06 | 20.26 | 09.06 | 21.26 | 04.21 | 16.41 | 03.21 | 15.41 | 06.21 | 18.41 | 07.21 | 19.41 | 05.51 | 18.11 | 07.06 | 19.26 |
| 9. okt | 06.46 | 19.05 | 05.46 | 18.05 | 06.01 | 18.20 | 08.46 | 21.05 | 09.46 | 22.05 | 05.01 | 17.20 | 04.01 | 16.20 | 07.01 | 19.20 | 08.01 | 20.20 | 06.31 | 18.50 | 07.46 | 20.05 |
| 10. okt | 07.24 | 19.44 | 06.24 | 18.44 | 06.39 | 18.59 | 09.24 | 21.44 | 10.24 | 22.44 | 05.39 | 17.59 | 04.39 | 16.59 | 07.39 | 19.59 | 08.39 | 20.59 | 07.09 | 19.29 | 08.24 | 20.44 |
| 11. okt | 08.04 | 20.24 | 07.04 | 19.24 | 07.19 | 19.39 | 10.04 | 22.24 | 11.04 | 23.24 | 06.19 | 18.39 | 05.19 | 17.39 | 08.19 | 20.39 | 09.19 | 21.39 | 07.49 | 20.09 | 09.04 | 21.24 |

5 707265 100036 >